# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 30.11.2020*

**Bygdaráðsfundur 30.11.2020 kl. 18.00 til kl. 18.25**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Selma Hansen. skrivari | x |
| | Sigurd Justinussen, skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

Formaðurin í teknisku nevnd kunnar um at eitt byggimál, sum ikki er í skránni, og biður um loyvi at leggja hettar fyri bygdaráðið.

**Bygdaráðið samtykkir.**

**Mál nr. 106/2020 Fíggjarætlan 2021 – 3. viðgerð**
J.nr.32102-2-2020
**Málslýsing**
Fyrsta viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2021 var fyri á bygdaráðsfundi 28.09.2020, og onnur viðgerð tann 26.10.2020.

Tann 18.11.2020 kom seinna metingin frá Fíggjarmálaráðnum uppá inntøkur fyri 2021 frá eftirlønargjøldum, og inntøku vegna Dis, Fas og frádráttir. Eingin broyting er í metingini viðv. eftirlønarinngjøldum, men ein meirinntøka á tkr. 118 er í metingini viðv. Dis, Fas og frádráttum. Meirinntøkan er innroknað í fíggjarætlanina við 3. viðgerð.

Tann 19.11.2020 kom seinna metingin frá Taks uppá skattainntøkuna fyri 2021. Seinna metingin er ein minniinntøka á tkr. 825 ímun til fyrru metingina. Eisini er ein rætting gjørd viðv. útrokningini í pensiónsfrádráttinum, sum gevur eina minniinntøka á tkr. 453, umframt at ein regulering/avrunding er ein meirinntøka á tkr. -278. Íalt ein minniinntøka tkr. 1.000, sum er innroknað í fíggjarætlanina við 3. viðgerð.

Rakstrar- og íløgukostnaður er óbroyttur í fíggjarætlanini við 3 viðgerð.

Roknað verður við at skattaprosentið er óbroytt 20,5% og at barnafrádrátturin er óbroyttur kr. 5.500.

**Høvuðstølini til triðju viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2021, eftir broytingar, eru hesi:**

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 30.11.2020*

| **Rakstur tkr.** | **2021** | **2020v/eykaj.** | **Munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristing | 5.057 | 5.220 | -163 | -3,1 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 19.437 | 18.171 | 1.266 | 7,0 |
| §3 Børn og ung | 13.453 | 12.032 | 1.421 | 11,8 |
| §4 Undirvísing | 4.189 | 4.153 | 36 | 0,9 |
| §5 Mentan og frítíð | 4.150 | 4.026 | 124 | 3,1 |
| §6 Teknisk mál | 4.774 | 4.517 | 257 | 5,7 |
| §7 Kommunalt øki | 3.694 | 3.332 | 362 | 10,9 |
| **Rakstur í alt** | **54.754** | **51.451** | **3.303** | **6,4** |
| | | | | |
| **§20 Inntøkur v.m.** | **63.108** | **60.455** | **2.653** | **4,4** |
| | | | | |
| **Úrslit áðrenn íløgur** | **8.354** | **9.004** | **650** | **7,2** |
| | | | | |
| **Íløgur tkr.** | | | | |
| §1 Kommunal fyrisiting | 0 | 0 | 0 | 0 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 1.613 | 1.489 | 124 | 8,3 |
| §3 Børn og ung | 500 | 10.892 | -10.392 | -95,4 |
| §4 Undirvísing | 0 | 750 | -750 | -100 |
| §5 Mentan og frítíð | 0 | 2.578 | -2.578 | -100 |
| §6 Teknisk mál | 82 | 7.684 | -7.602 | -98,9 |
| §7 Kommunal virki | 1.172 | 3.053 | -1.881 | -61,6 |
| **Íløgur í alt** | **3.367** | **26.446** | **-23.079** | **-87,3** |
| | | | | |
| **Úrslit aftaná íløgur** | **4.987** | **-17.442** | **22.429** | **128,6** |
| | | | | |
| **Afturgjald av skuld** | **2.910** | **3.223** | **313** | **9,7** |
| | | | | |
| **Av tøkum peningi** | **-2.077** | **6.665** | **-8.742** | **-131,2** |
| | | | | |
| **Lántøka** | **0** | **14.000** | **-14.000** | **-100** |

**Tilmæli**
Á fundi 25.11.2020 mælir Fíggjarnevndin til at skattaprosentið verður óbroytt 20,5%, og at barnafrádrátturin verður óbroyttur kr. 5.500.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 30.11.2020*

**Tilmæli**
Á fundi 25.11.2020 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við triðju viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2021 soleiðis, sum hon er uppsett. Afturgjald av skuld tkr. 2.910 verður fíggjað við rakstraravlopið. Íløgurnar á tkr. 3.367 verða fíggjaðar við rakstaravlopi og tkr. 2.077 verður flutt til tøkan pening.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 107/2020 Reguleringar til fíggjarætlanina fyri 2020**
J.nr. 32102-2-2019
**Málslýsing**
Reguleringar á fíggjarætlanini 2020 – fyrsta viðgerð.

Fyrisitingin hevur gjøgnumgingið raksturin higartil í ár, framroknað alt árið 2020 og samanborið við løgdu fíggjarætlanina fyri 2020. Fyrisitingin mælir til fylgjandi reguleringar á fíggjarætlanini fyri 2020:

| **Rakstur** | **tkr.** |
|---|---|
| §1 Kommunal Fyrisiting | -980 |
| §2 Almanna- & Heilsumál | 148 |
| §3 Børn & Ung | 406 |
| §4 Undirvísing | -28 |
| §5 Mentan & Frítíð | -424 |
| §6 Teknisk mál | -165 |
| §7 Kommunal virki | 972 |
| **Rakstur í alt** | **-71** |
| | |
| **Reguleringar í alt áðrenn íløgur** | **-71** |
| | |
| **Íløgur** | |
| §1 Kommunal fyrisiting | 0 |
| §2 Almanna- & Heilsumál | 0 |
| §3 Børn og ung | 0 |
| §4 Fólkaskúlin | 0 |
| §5 Mentan og Frítíð | 40 |
| §6 Teknisk mál | 0 |
| §7 Kommunalt virki | -40 |
| **Íløgur í alt** | **0** |
| | |
| **Reguleringar rakstur og íløgur** | **-71** |
| | |
| Rentustuðul og rentuútr. | 71 |
| | |
| **Úrslit av reguleringum** | **0** |

**Tilmæli**
Á fundi 25.11.2020 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við reguleringunum á fíggjarætlanini fyri 2020.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 108/2020 Bygdaráðsfundir og nevndarvikur 2021**
J.nr. 22022-2-2020
**Málslýsing**
Bygdaráðsfundir 2021.

Kommunan skal áseta og lýsa teir almennu bygdaráðsfundirnar fyri komandi ár. Undanfarna ár vóru bygdaráðsfundirnir mánadagar kl. 18.00. Uppskot til bygdaráðsfundirnar í 2021, sum skulu verða 10 í tali, eru:

**Fundir í 2021:**

| | |
|---|---|
| Mánadag | 25. januar |
| - | 22. februar |
| - | 22. mars |
| - | 26. apríl |
| - | 31. mai |
| - | 28. juni |
| - | 30. august |
| - | 27. september |
| - | 25. oktober |
| - | 29. november |

**Nevndarfundirnir í 2021 eru í viku:**
2-6-10-15-20-24-33-37-41-46.

**Tilmæli**
Á fundi 25.11.2020 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við, at bygdaráðsfundirnir fyri 2021 verða, sum ásett omanfyri.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 30.11.2020*

**<u>Mál nr. 109/2020 Keyp av møblum til Tofta skúla/Bókasavnið</u>**

<u>J.nr. 2100002-3-2020</u>

**Málslýsing**

Skúlin hevur tørv á nýggjum skúlamøblum til tvær stovur. Umsjónarmaðurin hevur heintað inn tilboð. Kostnaðurin er í alt kr. 113.680 u/mvg, kr. 120.785 v/6,25% mvg.

Skriv er komið frá starvsfólkunum á skúlabókasavninum, tey ynskja ein lesikrók á bókasavninum, og vísa á, at møblar við høgum ryggi eru við til at stimbra lesimentanina og skapa ró. Leiðslan á skúlanum hevur heintað inn tilboð uppá 2. stk. tweetsofur við høgum ryggi og ein endavegg á í alt kr. 22.235 u/mvg, kr. 23.625 v/6,25% mvg, hettar er helvtarprísur, tí møblarnir hava staðið til framsýning.

**Tilmælir**

Á fundi 25.11.2020 mælir Fíggjarnevndin til, at møblarnir til skúlastovur á kr. 120.785 verða keyptir, og at peningurin verður tikin av stovninum Fólkaskúlin.

Eisini mælir Fíggjarnevndin til, at møblarnir til bókasavnið á kr. 23.625 verða keyptir, peningurin verður tikin av stovninum Bygdabókasavnið.

**Avgerð**

Tilmælini hjá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 110/2020 Frábýti til grundstykkir</u>**

<u>J. nr. 234022-35-2019</u>

**Málslýsing**

Janus Fossdalsá, Toftir, søkir um at frábýta 2 grundstykki burturav ognini hjá teimum omanfyri vegin á Líðarenda á Nesi.

**Tilmæli**

Á fundi 17.11.2020 mælir Tekniska nevnd til at geva loyvi at frábýta 2 grundstykkir.

**Avgerð**

Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 30.11.2020*

**Mál nr. 111/2020 Umsókn um byggiloyvi**
J. nr. 234022-30-2018
**Málslýsing**
9. november 2020 søkir Torkil Ingvardsson um byggiloyvi til eini tvíhús. Staðsetingin er matr. nr. 474c við Lýðarsvegin.

Húsið er í 2 hæddum við slættari tekju. Betong brunaveggur er millum íbúðurnar. Grundvíddin á húsinum er 15,42m x 9,70m, og øll vídd er innanfyri ásettu karmar um byggistig v.m.

Parkeringspláss er til 4 bilar, 2 pláss hvørjumegin húsið.

**Tilmæli**
Á fundi 17.11.2020 mælir Tekniska nevnd til at geva byggiloyvi sambært viðløgdu skjølum.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 112/2020 Umsókn um grundstykki Haraldur S. Hammer**
J. nr. 234022-9-2020
**Málslýsing**
Haraldur S. Hammer ynskir at flyta sítt lítla hús, sum stendur við Lýðarsvegin, eitt sindur norðureftir og søkir tí um at fáa økið frámatrikkulera. Staðsetingin verður við ánna, sum liggur sunnanfyri nýggju útstykkingina við Lýðarsvegin.

Húsið verður staðsett ovarliga á nýggja stykkinum, við einum fráleika á minst 2,5 m til grannamarkið sunnanfyri. Gongugøta verður frá Lýðarsvegnum og niðan til húsið. Somuleiðis vera 2 parkeringspláss við atkomu frá Lýðarsvegi gjørd.

**Tilmæli**
Á fundi 17.11.2020 mælir Tekniska nevnd til at umsøkjarin fær loyvi at sundurbýta nevnda lendi til síni frítíðarhús. Í hesum loyvinum er eisini treytað, at 2 parkeringspláss vera tilknýtt ognina.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 113/2020 Umsókn um byggiloyvi til wc bygning**

J. nr. 234022-27-2020

**Málslýsing**

Tann 13. november 2020 kemur umsókn frá Niclas Davidsen um byggiloyvi til ein wc bygning. Talan er um ein liðugtbygdan sjálvstøðugan bygning á 12m², og ætlanin er at staðseta hann norðanfyri húsini, matr.nr.573, sambært viðløgdu skjølum.

Tekniski leiðarin mælir til at geva byggiloyvi. Har er m.a.góðkend kloakkskipan til íbinding, og fráleikin til grannamark er í lagi.

**Tilmæli**

Á fundi 17.11.2020 mælir Tekniska nevnd til at geva loyvi, og at bygt verður sambært galdandi byggireglum. Eisini verður mælt til, at frástøðan millum wc-bygningin og sethúsini fær ein virðiligan dám, við einari tekju.

Niclas Davidsen var úti undir viðgerðini.

**Avgerð**

Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Niclas Davidsen var úti undir viðgerðini.

**Mál nr. 114/2020 Umsókn um graviloyvi**

J. nr. 234022-14-2020

**Málslýsing**

16. november 2020 søkir Haldur Vang, byggimeistari, um graviloyvi vegna Júst í Túni, byggiharra og eigara, til eini sethús.

Staðsetingin er uppi á Hamri, matr.nr.465. Grundplanurin verður 8,40m x 10,40m, og húsini vera í tveimum hæddum við slættari tekju.

**Tilmæli**

Á fundi 17.11.2020 mælir Tekniska nevnd til at geva graviloyvi. Tað er treytað av, at umsøkjarin søkir avvarandi eigarar um loyvi at brúka atkomuvegin niðan til stykkið. Harafturat skulu 2 parkeringspláss gerast samstundis sum grivið verður.

**Avgerð**

Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 30.11.2020*

**Mál nr. 115/2020 Umsókn um byggiloyvi til bilskýli**
J. nr. 234022-2-2017
**Málslýsing**
Í telduposti 27. september 2020 søkir Christian Andreasen um byggiloyvi til eitt bilskýli.

Víddin er: Breidd 5,5m, longd 6,00m, og samlaða hæddin er 3,55m, har tekjan er mønureist.

Staðsetingin er á parkeringsplássinum sunnanfyri sethúsini við Regnaveg.

Á fundi 17.11.2020 mælir Tekniska nevnd til at tekniski leiðarin fer í ein dialog við umsøkjarin áðrenn tilmæli verður gjørt.

Eftirfylgjandi hevur umsøkjarin játtað at planeringin av bilskýlinum fer nakað niður í lendið og at tekjan á bilskýlinum verður sløtt.

**Tilmæli**
Á fundi 30.11.2020 mælir Tekniska nevnd til at geva byggiloyvi til bilskýli við sløttum taki, at bilskýlið fer nakað niður í lendi, og at bygt verður sambært galdandi byggireglum.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Høgni Hansen var úti undir viðgerðini.